# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*5. februar fekk Petur Sjúrður eina lítlasystur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4140 gr. Foreldrini eita Rúna og Dan Lamhauge.*

6. februar fingu Gunrið og Hans Jákup Kallsberg, Viðareiði, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4400 gr.

6. februar fingu Katrin Rubek Nielsen og Mortan A. Carlsen, Keypmannahavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3372 gr.

9. februar fingu Durita Joensen og Rotem Avni, Århus, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 3050 gr.

9. februar fingu Ragnhild Petursdóttir Kjærbo og Jógvan Kristiansen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3115 gr.

10. februar fingu Eivy J. Olsen og Jan Johannesen, Søldafjørður, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3675 gr.

10. februar fingu Karin Lassen og Eliesar Lydersen, ein son og Torgerð og Elin ein beiggja. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4550 gr.

11. februar fingu Poula Paturson og Hanus Skaalum Midjord, Bagsværd, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3620 gr.

11. februar fingu Olga K. og Sigmund Petur Skorastein, Leirvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3900 gr.

12. februar fingu Maiken P. og Leif Erik Englund, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 3950 gr.

12. februar fingu Rakel Helmsdal og Jógvan Olsen, Havn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3500 gr.

14. februar fingu Esther Dahl og Jantórur E. Joensen, Skála, ein son. Hann var 48 cm. langur og vigaði 3200 gr.

14. februar fingu Beinta og Eddie Ennigarð, Oyrarbakki, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4000 gr.

15. februar fingu Lena og Gunnar Justinussen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3415 gr.

16. februar fingu May-Britt Jacobsen og Thorfinn J. Poulsen, Tvøroyri, ein son. Hann var 46 cm. langur og vigaði 2260 gr.

15. februar fingu Vivian og Jens Kristian Hansen, Nes, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3950 gr.

**Fríggjadagur 17. februar 2006:**

# Í dag verður Ólavur Hátún sjútifimm ár



## Ein heilsan til sangmeistaran

*Syng mær eitt lag av ytstu trom,
har kveikjand ljós brenna bjørt
undir lon,
har Mozart og Bach
á himnavøllum
og nótabløðum
í jarðiskum høllum
liva í taktum og øktum
millum orð og ljóm.*

*Tú lyfti upp Mozart,
tú lyfti upp Bach
í guddómligari takt,
og legði ljóð á mannavørr
við Vagn Holmboe
í skaldskapi
úr føroyskari ond –
við nútíðardámi
úr musiskari vond.
Syng eitt gamalt,
rótføroyskt sálmalag!
Syng eina kantatu!
Í Listaskála og Norðurlandahúsi,
har fjøllini daga
í fjallagreinum
um firðir sund
í okkara
innastu lund!*

*Har stóðst tú,
tá stríður streymur,
leikandi íður,
froðandi streingir –
í froðuskoti
sungu sínar fosturlandssangir
í hjómhvítum brimgangi
og linkandi landbrimi,
lygnum og vaðgotum,
tá vetur, vár og summar
í kyldum í løtum
nurtu við ungt hold
undir grønum líðum
á Føroyafold.*

*Ólavur!
Við krýna títt høvur
við krokusmyrtum,
nú sjútifimm ár eru farin
í eitt musiskt, musikalskt
tíðarhav.*

*Har er eitt lag,
sum er títt
í barmi hugans yrktum
av krokusmyrtum!*

**Frits**

---

### Brúdleyp

Leygardagin 18. februar giftast í Keypmannahavn Jóna Ólavsdóttir úr Miðvági og Frans Fossá av Tvøroyri.

Leygardagin 18. februar kl. 17.00 giftast í Vesturkirkjuni Frida Jóanesarson og Odd Dam.

Leygardagin 18. februar kl. 14.00 giftast í Elim í Søldarfirði Helena Mortansdóttir, Tórshavn og Dávur P. Jacobsen, Søldarfjørður. Veitslan verður á Hotel Hafnia fyri innbodnum.

### 60 ár

Føðingardagurin hjá Eddu Gaard í Vági, verður hildin leygarkvøldið 18. februar kl. 19.00 í VB-húsinum og ikki í »Framtíðini« sum áður lýst.

### 75 ár

Mikudagin 15. februar fylti Jovina Højgaard, Hellutún 2, Tórshavn, 75 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 18. februar frá kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Prógv

27. januar tók Annfinn Hjelm, Vágur, prógv við lærda háskúlan í Aalborg, sum cand-scient.adm.

31. januar fekk Mirjam Mikkelsen, Tórshavn, prógv í Professionsbachelor í sjúkrarøkt á H.S Sygeplejerskeuddannelsen í Keypmannahavn.

## Dagurin í morgin

**18. februar. Concordia**, deyð umleið ár 250. Lítið kend halgikona í fornkirkjuni.

**19. februar. Ammon**, deyður umleið ár 250. Var ein av teimum rómversku hermonnunum, sum við at síggja dirvi og trúarvissu teirra kristnu, sjálvur gjørdist kristin og varð tikin av døgum.

**20. februar. Eucharias**, deyður ár 788. Biskupur í Orleans, sum fyri fleiri undurgerðir varð skírdur halgimenni.



Lesið Sosialin so eru tit við